# Tað er ræst at roykja

**Heilsunevndin í Klaksvíkar Býráð og báðir fólkaskúlarnir í Klaksvíkar halda altjóða tubbaksfría dagin nú hósdagin. Dagurin sjálvur er tó ikki fyrr enn fríggjadagin. Á skránni hósdagin verða ymisk tiltøk, sum skulu verða við til at fáa boðskapin Tað er ræst at roykja út til tey ungu, so at tey leggja av at roykja ella enn betur ongantíð byrja. Á tíðindafundi í Klaksvík í gjár varð greitt frá, hvat fer at henda á hesum degi**

ROYKING
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** Báðir skúlarnir í Klaksvík hava arbeitt við royking fleiri ferðir í evnisvikum og døgum. Og er hetta alt ein liður í at upplýsa teim ungu um vandan av at roykja. Tí royking er ein óvani, sum vindur upp á seg í skúlunum í Klaksvík.

Skipað hevur verið fyri eini teknikapping til børnini frá fyrsta til og við fimta flokki, og eini slagorð kapping fyri teim eldru børnunum. Hósdagin verða so vinnararnir av hesum báðum kappingunum funnir, og fer Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri at handa virðislønirnar.

Tina Purkhús, lærari í skúlanum við Ósánna, sigur, at tey hava fingið nógvar tekningar, men ikki so nógv slagorð.

Altóða tubbaksfrii dagurin, sum verður fríggjadagin 31.05.02, verður av ymiskum orsøkum hildin í Klaksvík longu hósdagin. Tað er heilsunevndin í Klaksvíkar Býráð saman við báðum fólkaskúlunum, sum skipa fyri degnum.

Í samband við dagin verður hósdagurin ein øðrvísi skúladagur í Klaksvík. Børnini verða býtt í tvey frá fyrsta til fimta flokk og frá sætta til tíggjunda flokk. Tey yngru børnini verða í fimleikarhøllini, og tey eldru verða í Skúlanum við Ósánna. Ymiskt spennandi verður á skránni, til dømis verður ein gandakallur úr Týsklandi við. Tað er Føroya Bjór, sum hevur fingið hendan gandakallin hendavegin. Eisini verður tónleikur við millum annað Karl Martin Samuelsen. Hjá teim eldru børnunum verður ein kanning um roykivanar og eisini eitt »legg av« skeið, sum Maria Olsen skipar fyri.

Rani Nolsøe, formaður í heilsunevnd Klaksvíkar Býráðs greiðir frá, at longu tíðliga í hesum valskeiðinum setti heilsunevndin sær fyri at føra ein greiðan heilsupolitikk, herundir eisini ein roykipolitikk. Ein arbeiðsbólkur bleiv gjørdur, sum fekk til uppgávu at skipa fyri ymiskum í sambandi við altjóða tubbaksfría dagin og fyribyrgjandi arbeiði annars. Hesin arbeiðsbólkur ella roykibólkurin, sum hann eisini verður kallaður, er mannaður við tveimum umboðum fyri lærararnar úr hvørjum skúlanum og so formaðurin í heilsunevndini sjálvur.

Tina Purkhús, sum er í roykibólkinum, sigur, at arbeiðið við royking í millum ung er ein langtíðarætlan, og eru tiltøkini hósdagin bert ein partur av øllum arbeiðinum, sum verður gjørt.

– Alt tað fyribyrgjandi arbeiðið, sum verður gjørt í skúlunum er positivt, men vit koma ikki rundan um, at heilsusystrarnar spæla eisini ein týðandi leiklut. Serliga fyri framtíðarfyribyrgjandi arbeiðið, sigur Tina Purkhús.


*Roykibólkurin, sum varð settur til at arbeiða við roykipolitikkinum í Klaksvík, her avmyndað saman við Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóra*

## Ongin gullgrubba

Kári Slættanes á Føroya Tubbaksølu vónar, at alt fyribyrgjandi arbeiðið í móti royking fer at hjálpa og geva úrslit. Hann sigur eisini, at nú á døgum verður ein ikki ríkur av at selja tubbakk.

– Mín partur í tubbakssøluni er so lítil, so tað er sanniliga ikki nøkur gullgrubba at selja tubbakk, sigur hann í stuttari viðmerking.

Høgni Hansen, stjóri hjá Poul Hansen heilsølu, sigur, at slík tiltøk eru bara positiv. Hann dugir ikki at siga, um málbólkurin fyri tubbakki gerst alt yngri og yngri, tí tað ikki er loyvt at marknaðarføra tubbakk í dag, og sostatt eru ongin hagtøl at halda seg til.






# ítróttur

Nr. 100 • hósdagur • 30. mai 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Vaktarskifti í KÍ

**KÍ hevði aðalfund týskvøldið, og lagt var upp til kampval. Endin var, at Svend Jacobsen fall, og Gestur Hovgaard er nýggjur formaður. Innanhýsis trupulleikar og vánalig fíggjarstøða eru møguliga orsøkin til, at Svend fall**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Nýggi formaðurin í KÍ er Gestur Hovgaard. Hann hevur bara verið knýttur at felagnum í tvey ár, men er fúsur at fara undir uppgávuna. Hann er nýggjur í felagnum, men hann heldur, at hetta kann vera ein fyrimunur hjá sær í felagsarbeiðinum.

Á aðalfundinum var roknskapurin hjá felagnum lagdur fram, og hann vísti eitt hall á 221.000 krónur, meðan skuldin hjá felagnum er omanfyri tvær milliónir krónur. Møguliga var hetta ein av orsøkunum til, at formaðurin fall.

Fyrrverandi formaðurin Svend Jacobsen fekk 20 atkvøður á fundinum, meðan Gestur Hovgaard úr Vági fekk 27 atkvøður. Sostatt er vaktarskifti í KÍ greitt.


*Gestur Hovgaard er nýggjur formaður í KÍ. Hann vann atkvøðugreiðsluna móti fyrrverandi formanninum Svend Jacobsen*

## Skeyt Gest upp

Odd Færø, ið er skrivari í fótbóltsdeildini, var maðurin, sum skeyt Gest Hovgaard upp sum valevni, og hann heldur, at eitt skifti var neyðugt.

– Fíggjarstøðan í felagnum er ikki góð, og ein tann fyrsta uppgávan hjá nýggja formanninum er at beina skútuna á rætta kós. Eitt vaktarskifti var tí neyðugt í felagnum, sigur Odd.

Hann leggur afturat, at felagið hevur havt innanhýsis trupulleikar, og hann hevur saknað opinleika í nevndararbeiðnum, samstundis sum samskiftið í felagnum ikki var nóg gott. Hann vísir tó staðiliga aftur, at hetta nevndarvalið hevur nakað samband við ósemjuna í felagnum í fjør, tá fótbóltsdeildin legði arbeiðið niður.

Hann er sannførdur um, at Gestur kann gera eitt munagott arbeiði fyri felagið framyvir. Odd sigur seg tó samstundis vera keddan av mátanum, sum vaktarskiftið fór fram uppá.

## Fúsur til verka

Gestur Hovgaard er annars kendur sum valevni til løgtingsvalið og frá granskingardeplinum fyri økismenning, men nú er hann eisini formaður í fótbóltsfelag.

Gestur sigur, at hann hugsaði seg væl um, áðrenn hann tók av tilboðnum um at stilla upp, tí felagsarbeiðið er altíð strævið. Hann fer tó framfúsin, nú hann hevur fingið hetta álitið á aðalfundinum. Gestur hevur verið venjari í yngru deildunum í eini tvey ár.

Sosialurin royndi at fáa eina viðmerking frá Svend Jacobsen, men boðini frá telefongentuni í Føroya Banka vóru, at hann ikki vildi tosa við bløðini fyrr enn eftir arbeiðstíð.

# FCK keypir hondbóltsfelag

**Felagið hjá Toda Jónsson hevur nú eisini fingið eina hondbóltsdeild. FCK við Flemming Østergaard á odda hevur keypt hondbóltsfelagið FIF, sum framyvir skal eita FCK Håndbold**

HONDBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Fredriksberg Idrætsforening, FIF, hevur leingi verið um at fara av knóranum, men nú er felagið bjargað. Tað er eingin annar enn Flemming Østergaard, stjóri í fótbóltsfelagnum FCK, sum ígjøgnum partafelagið Parken Sport & Entertainment hevur keypt FIF. Parken Entertainment eigur eisini FCK.

Flemming Østergaard ella Don Ø, sum hann eisini verður nevndur, hevur stórar ætlanir við hondbólti í høvuðsstaðnum. Ætlanir eru frammi um at gera ein hondbóltsvøll í sjálvari Parkini, so at FIF framyvir kann at spæla sínar dystir frammanfyri 17.000 áskoðarum.

Østergaard er ivaleysur um, at peningur er at vinna í donskum hondbólti, og tað er orsøkin til, at hann hevur valt at keypa eitt hondbóltsfelag.

# GÍ havt aðalfund

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Nýggjur formaður í Gøtu Ítróttarfelag er Jógvan Gregersen. Hann tekur við eftir Svenn Olsen, sum fer frá.

Týskvøldið í farnu viku hevði GÍ árliga aðalfundin, har nýggj nevnd varð vald. Á heimasíðu felagsins stendur, at nýggja nevndin hevur skipað seg við Jógvan Gregersen sum formanni. Næstformaður er Brandur Jacobsen. Regin Gregersen er peningarøkil, Sonja á Líðarenda er skrivari og Peter Holm er seinasti nevndarlimurin.

Soleiðis er øll manningin í gomlu nevndini hjá GÍ skift út, tí eingin av nevndarlimunum helt fram eftir fundin.

# Heðin á Lakjuni fingið álvarsaman skaða

**Undir venjing ígjár, var Heðin so óheppin at bróta eitt bein í fótinum**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

KÍ skal klára seg í einar 2 mánaðir uttan Heðin á Lakjuni. Í gjár var hann so óheppin at bróta eitt bein í fótinum undir venjing. Hann hevur fingið boð frá læknanum, at tað ganga minst 6 vikur, áðrenn hann kann byrja at venja aftur.

Sostatt verður hetta steinur oman á byrðu hjá KÍ, sum skjótt skal fáa nøkur stig til høldar, eftir vánaligu byrjanina.



*Heðin á Lakjuni verður ikki tøkur hjá KÍ komandi vikurnar*